


Nr. 25 6. desember 2020 80. árg.

# Lít á Guds tíðarætlan

*„Men tá ið fylling tíðarinnar kom, sendi Gud son sín…“ Gal. 4,4.*

Gud spyr ikki okkum til ráðs fyri at tryggja sær, at ætlanir hansara hóska inn í okkara álmanakka. Gud ásetir sjálvur tíðarætlanina, og viðhvørt mugu vit renna fyri at fylgja við, meðan vit til aðrar tíðir mugu minka um ferðina fyri at ganga í takt við hann.

Maria ætlaði sær at giftast við Jósefi og so fáa eitt barn, men Gud hevði eina aðra ætlan. Barnið skuldi ikki hava nakra niðurarvaða synd, so tað skuldi hava ein lýtaleysan pápa, og tí skuldi Heilagi Andin taka sær av tí.

Menniskjuliga talað kundi tíðarætlanin ikki verið verri. Maria gjørdist við barn, áðrenn hon var gift, og Jósef var ikki pápi barnið. Umframt at hon kundi blivið útblakað, segði lógin, at hon kundi blivið steinað til deyðis. Hvussu svaraði hon aftur? Tá segði Maria: „Sí, eg eri tænastukvinna Harrans; verði mær eftir orðum tínum!“ Og eingilin fór frá henni.“ (Luk. 1,38).

Gud hevur eina fastlagda ætlan, og hann arbeiðir altíð fram móti henni. Trupulleikin er, at vit bara arbeiða út frá einari avmarkaðari vitan, so vit gerast ótolin, ill og kedd, tá ið hann ikki svarar bønum okkara, tá ið vit halda, at hann átti, ella upp á tann mátan, vit halda, at hann skal.

Sagt verður, at George Müller, evangelistur og tann, sum stovnaði barnaheimið „Ashley Down“ í Bristol í Onglandi, einaferð bíðaði niðri á bryggjuni eftir einum serligum stóli, sum hann skuldi fáa. Hann hevði ringan rygg, og honum tørvaði

henda stól til sína sjóferð. Tá ið tíðin kom, at skipið skuldi fara, og stólurin enn ikki var komin, bjóðaði vinur hansara sær at keypa honum ein. Men Müller segði: „Annaðhvørt vil Gud geva mær hann, ella eisini vil hann geva mær náði at vera hann fyri uttan."

Men sum ein góður Hollywood filmur endar, so kom stólurin rættstundis!

Lít á Gud. – Hann veit, hvat ið hann ger!

*„... et Ord til dagen"* - *Effie Campbell* umsetti.

# Hvør hevur umsorgan fyri sál míni?

*Aril Edvardsen*

Undan jólum var eg eina tíð í Fort Lauderdale í Florida á missiónsskrivstovu okkara. Meðan eg var har, vóru tað tvinni ting, sum brendu seg inn í hugan á mær.

Konan og eg sóu ta víðagitnu jólabáta-hersýningina. Bátar í hundraðtali í øllum skapum og støddum, prýddir við ljósum í øllum hugsandi litum, fóru fram við okkum í nógvar tímar. Luttakararnir mugu hava brúkt dollarar í milliónatali til alt hetta flotta prýðið.

Aftaná fóru vit til hús og koyrdu sjónvarpið frá og sluppu at síggja mótsetningarnar. Eitt kent sjónvarpslið í USA var júst komið aftur úr Etiopia. Teir vístu myndir av svøltandi og doyggjandi menniskjum, og tey teljast í milliónatali í Afrika. Á tann ovurmikli munur!

Eg kom at hugsa um eitt bíbliuvers: „Sí, synd Sódomu systur tínar var dramblæti (stoltleiki); hon og døtur hennara høvdu nøgdir av mati og livdu sorgleyst í náðum, men hjálptu tó ikki hinum neyðstadda og fátæka." (Ezek. 16,49).

Men sjónvarpssendingin vísti eisini ta positivu síðuna, nevniliga hvussu amerikumenn svaraðu aftur upp á neyðina í Etiopia, og hvussu matveitingar í rúgvutali úr USA og Vesturevropa vórðu sendar inn í Etiopia og Sudan.

Vit hava sæð myndir sum hesar aftur og aftur. Vit sóu tær úr Biafra, Bangladesj, India, Miðafrika og Miðeystri. Tað tykist ongan enda at taka – myndir av doyggjandi og svøltandi menniskjum í milliónatali og hjálparfelagsskapir við fullari ferð inn í støðuna, í eini roynd at bjarga teimum undan hungursdeyðanum. Hetta er ábyrgdin hjá teimum ríku

londunum. Tað eru vit, sum mugu hjálpa hesum doyggjandi menniskjunum.

Mitt millum allar hesar milliónirnar, sum doyggja í teimum ymsu londunum, eru tað sera fá, sum leggja lag í tær ævigu, ódeyðiligu sálirnar. Bara tey, sum hoyra Jesusi til, brýggja seg um mannasálir.

Um tú hevur andalig opin oyru, hoyrir tú tey eymkandi rópini úr innasta hjartarúminum hjá hesum svøltandi og doyggjandi menniskjunum runt um í heiminum. Sálirnar hjá hesum søkjandi og langtandi menniskjunum rópa eymkandi: „Ikki ein er, sum spyr eftir sál míni." (Sálm. 142,5 V.D.).

Hava tey kristnu í Vesturheiminum mist ævinleikasýnið í teirra „kristna" trúboðaravirksemi? Hví er tað lættari at savna dollarar í túsundatali í USA og Skandinavia at geva teimum svøltandi í Etiopia mat enn at náa tey ónáddu fólkasløgini við boðskapinum um frelsu fyri teirra ævigu sál?

Tvær milliardir hava framvegis ikki hoyrt evangeliið fyri fyrstu ferð. Tey amerikansku handilsfólkini hava spreitt Coca Cola og Hollywood-filmar at kalla út um allan heimin. Kommunistarnir hava spreitt sín boðskap til hvønn mann og hvørja konu síðani 1917.

Japanar hava spreitt sínar vørur til hvønn bý og hvørja bygd síðani annan veraldarbardaga. Men Jesu meinigheit hevur bara rokkið tveir triðjapartar av heimsins fólkum í 2000 ár.

Hví hava vit ikki rokkið líka langt við „okkara vøru"? Er tað, av tí at vit hava avmarkað „tørvin" hjá teimum til bara at vera ein materiellan tørv? Eg kvíði fyri tí.

\- - -

Onkur hevur sagt, at mafian fer ikki at fíggja evangeliseringina. Tað eru tey kristnu, sum mugu tað. Minst til, tá ið vit koma heim til himmals, fara vit ikki at ganga á asfalti. Tá ganga vit á gulli.

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus fór at gráta

*„Jesus feldi tár." Jóh. 11,35.*

Ber tað til, at vit bæði kunnu vera púra vónleys og fyri ongum, tá ið vit missa ein, vit eru góð við, tá ið vit samstundis trúgva upp á uppreisnina, har alt fer at verða lukkuligt og vakurt?

Ja! Tí fyri tað fyrsta hevur Gud skapt okkum sum menniskju við kenslum. Góðkenna vit ikki tær, fáa vit trupulleikar við at vera heil menniskju. Vit høvdu verið óærlig móti okkum sjálvum, um ikki eisini sorgin og kanska óvissan fingu sítt pláss. Fyri tað annað er tað akkurát soleiðis, Jesus sjálvur ber seg at í versinum omanfyri. Og hann veit ómetaliga væl um ta serligu og undurfullu ætlanina, sum bleiv løgd í Himli eftir syndafallið. Hann veit, at hann sjálvur hevur maktina at gera livandi aftur, og hann veit helst, at tað fer hann at gera fáar minuttir seinni! Og kortini grætur hann. Hann grætur, tí hann sær. Hann sær pínuna, líðingina, vónloysið, og hann kennir á sær, hvussu ilt tú fært, tá ið deyðin tekur lívið.

Vit kunnu sostatt gott gráta um líðingina, samstundis sum vit krøkja okkum í vónina. Tí Gud sjálvur grætur eisini – eisini við tær í dag.

*Effie Campbell* umsetti.

*Tað er eins og yvir um deyðans sund*
*alt tíðari vinirnir fara,*
*og eftir vit sita við sorg í lund*
*og sakna ein burtfluttan skara.*
*Tess longur várt æviskeið er á jørð,*
*tess vissari sorgin og tregin,*
*og vinafjøldin skjótt handan fjørð*
*gerst størri enn hesumegin.*

**Yrkt hevur** Petur W. Háberg, *eldri.*

---

# Fylgja Jesusi

Jesus sigur: „Fylgið mær eftir, so vil eg gera tykkum til mannafiskarar." Matt. 4,19.

Besta og týðiligasta tekini uppá, at tað av sonnum er Jesusi, vit fylgja, er, at vit eru mannafiskarar. Sambært Jesusi er tað hetta sporið, sum vit skulu halda okkum í allan vegin, og Hann er tann, sum ger okkum til mannafiskarar.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 6. des. | Tekstur: Luk. 1,26-31 + 36-45 + 56. | bíbliuorð: Luk. 1,37. |
| 13. des. | Tekstur: Luk. 2,1-20. | bíbliuorð: Luk. 2,11. |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 26** **20. desember 2020** **80. árg.**

# Guds tíðarætlan er røtt

*„Tað, sum eg talaði, lati eg henda…“ Jes. 46,11.*

Gud hevur eina ætlan fyri lív títt, sum krevur, at ávís ting skulu henda á einari heilt ávísari løtu. Og av tí at hann sær ta stóru myndina, og tú arbeiðir við avmarkaðum upplýsingum, skalt tú líta á hann – sjálvt um tú ikki dugir at síggja, hvussu alt kemur at fara fram. Eitt mist samband ella arbeiði kann Gud taka og fáa „alt at samvirka tær til góða“ (Róm. 8,28). Trupulleikin er, at meðan hann ger alt hetta, kanst tú kenna teg illa til passar og rættiliga neyðarsligan.

782 ár fyri Jesu føðing segði Mika profetur, at Jesus fór at verða borin í heim í Betlehem (Sí Mika 5,2). Men Maria og Jósef búðu í Nasaret. So, hvussu loysti Gud tann trupulleikan?

Rómverski keisarin Augustus tók ta avgerð, at nú skuldi ein fólkateljing setast í verk: „Og øll fóru at verða skrivað, hvør í ættarbygd sína. Men eisini Jósef fór úr Galileu, úr bygdini Nasaret, niðan til Judeu, til Dávids bygd, sum eitur Betlehem, tí at hann var slektaður av Dávids húsi og ætt, at verða skrivaður, saman við Mariu, trúlovaðu festarmoy síni, sum var við barn. Men tað hendi, meðan tey vóru har, at tíðin kom, at hon skuldi eiga barn. Og hon átti son sín, hin fyrstafødda, og hon reivaði hann og legði hann í eina krubbu…“ (Luk. 2,3-7).

Stúrir tú fyri framtíðini? „Bíða eftir Harranum og halt teg á vegi Hansara! So skal Hann seta teg høgt, so tú arvar landið…“ (Sálm. 37,34).



Lat frið falla á teg: Tann Gud, sum syrgdi fyri, at sonur Hansara varð føddur inn í ta røttu familjuna, ta røttu løtuna, á røttum staði, syrgir eisini fyri tær.

*„…et Ord til Dagen“ - Effie Campbell* umsetti.

# Eitt kongadømi uttan mørk

*Aril Edvardsen*

Beint fyri føðing Jesusar kom ein eingil til Nasaret til Mariu, sum skuldi føða hann. Og eingilin bar hesi boðini, sum vit finna í 1. kapitli hjá Lukasi: „Tú skalt verða við barn og eiga ein son, og navn hansara skalt tú kalla Jesus. Hann skal verða stórur og verða kallaður sonur hins hægsta, og Gud Harrin skal geva honum **hásæti Dávids**, faðirs hansara; og **hann skal verða kongur** yvir ætt Jákups **allar ævir**, og á kongadømi hansara skal eingin endi verða.“

Hinir kongarnir doyggja, og prinsar og arvingar koma í teirra stað. Blair ræður ikki í Fraklandi, Chirac ræður ikki í Onglandi, Bush ræður ikki í Russlandi, Putin ræður ikki í Amerika. Tí teir hava síni mørk, síni øki. Men hesin kongur, sum vit tala um her í dag, hann hevur eingi mørk, sum hann heldur seg innanfyri við stjórnarvaldi sínum. „Men á kongadømi hansara skal **eingin endi verða**.“

Hann fer ongantíð at doyggja, fer ongantíð at missa kongstignina og verður ongantíð settur frá. Ongantíð noyðist hann at fara í útlegd, og ongantíð fer eitt stjórnarkvett at blaka hann av trónuni, tí „hann skal verða kongur **allar ævir**.“



## Profetarnir boðaðu føðing hansara

Talað var um Jesus frammanundan, mong hundrað ár frammanundan, hvussu virki hansara skuldi verða. Jesaja sigur uml. 800 ár fyri føðing hansara, at hann skuldi verða borin í heim av eini jomfrú. Ótrúligt! Hann er hin fyrsti og seinasti, sum er føddur av eini jomfrú.

Mika sigur okkum, at hann skuldi føðast í Betlehem. Tað segði hann mong hundrað ár, áðrenn hann kom. Dánjal segði okkum 480 ár fyri føðing kongs tíðina, nær hann fór at verða borin í heim, og hvussu hann fór at verða dripin.

Túsund ár fyri komu hansara segði Dávid okkum, at hesin kongur fór at verða hongdur upp á ein kross og fór at



verða gjøgnumstungin í hendur og føtur. Zakarja segði mong hundrað ár undan komu Kongs, at hann fór at verða svikin fyri 30 silvurpengar. Jesaja segði, hvussu hann skuldi leggjast í grøvina hjá einum ríkum manni, men skuldi rísa uppaftur. Dávid segði, at hann skuldi fara til himmals og sessast við høgru hond Guds.



## Føðing Kongs

Tá ið kongsbørn verða borin í heim, fyrireika tey seg uppi á kongsborgini. Kongsbørn verða ikki løgd í hvørja sum helst song. Har er skart og skreyt á kongsborgini, av tí at tað er ein kongur, sum kemur í heim. Og tá ið tilburðurin er farin fram, so fara tíðindini út frá øllum heimsins útvarpsstøðum, at nú er eitt kongsbarn føtt.

Tá ið Jesus varð føddur í Betlehem, so nýttist honum onga himmalsong, og honum nýttist einki skart og skreyt at varðveita kongstignina. Tað gjørdi ikki petti, um teir løgdu hann í eitt fjós. Tað bilti einki, um hann var borin í heim mitt millum dýrini, tað bilti einki, um hann lá í einari krubbu við hálmi og strái, tí hann var ein sovorðin stórur kongur, at hann kundi verða lagdur har uttan at missa kongstignina.

Og har vóru eingir jarðiskir boðberarar, sum kunngjørdu føðing hansara, tí honum nýttist tað ikki. Men allir himmalsins herskarar søgdu hesari jørð frá, at Kongurin var føddur. Allur tann stjørnuklári himmalin kring Betlehem og Judafjøllini fyltist við einglum í milliónatali, sum róptu út: „Heiður veri Gudi í hægsta himli, nú er Kristus føddur, Kongurin í Dávids staði."

Og Gud setti eina nýggja stjørnu á himmalin við hetta høvið, av tí at Kongurin varð borin í heim, og teir vísu kongarnir úr Asia sóu Betlehemsstjørnuna, og teir komu yvir fjøll og dalar at tilbiðja kongin, sum var komin til jarðar.

Ein kongur var borin í heim.



## Verumáti kongs

Tá ið eg lesi um Jesus Kristus - um lív hansara og levnað, so ber hann seg at sum ein kongur, frá føðingini og til hann aftur situr á trónuni í himli. Ongantíð skalv hann, ongantíð var hann bangin, ongantíð bað hann um ráð, ongantíð spurdi hann: „Hvat skal eg gera? Kanst tú hjálpa mær?"

Ongantíð bað hann nakran hjálpa sær. Ongantíð ivaðist hann, ongantíð var hann ótryggur, ongantíð skalv hann, ongantíð misti hann tamarhaldið á sær. Um tað var **ein** djevul ella tað var ein heil legión við djevlum og demonum í túsundatali, sum stóð framman fyri honum, so var hann líka sinniligur. Hann var kongur. Og tá ið hann vaks upp, so vaks hann upp sum kongur - fullkomin.

Tá ið hann – 30 ára gamal – eftir dóp sín í Jordan, har Andans dúgva var komin yvir hann, hevur stríðst við djevulin í oyðimørkini, so vendir hann aftur, fyltur av Heilaga Anda og kraft. Hann kemur ikki aftur sum ein vanligur prædikumaður, har alt gleppur niðurfyri og endar úrslitaleyst eitt kvøld og vinnur eitt umfar eitt annað kvøld; men hann kemur aftur sum kongur. Tá ið hann reikar um á Ísraels jørð, úr suðri í norð, úr eystri í vestur, bygd úr bygd, bý úr býi, so gongur hann sum ein kongur alla tíðina.

Hann gongur sum ein kongur. Hann gongur í sigri. Hann hevur sigrað á synd, sjúku, deyðans og myrkursins makt. Tað er Jesus, sum eina kann fyrigeva okkum syndirnar.



*Effie Campbell* umsetti.

---

Eg hugsi altíð um, at allir prædikumenn eru kallaðir av Gudi og tala vegna Gud. Tá fái eg altíð okkurt burtur úr tí turrastu prædikuni, tí eg skilji persónin frá embætinum. Tá ið vit leggja okkum inn undir myndugleikan í Guds orði og embæti, fara vit at hava eina væntan, tá ið vit fara á møti. Eg fari upp hvønn morgun við einari væntan, tí: „Hetta er dagurin, ið Harrin hevur gjørt." Sálm. 118,24.

*e.c.* ums.



**Sunnudagsblaðið**

**ynskir øllum eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári**

---

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | |
|---|---|---|
| 20. des. | Tekstur: Matt. 2,1-15 + 19-23. | bíbliuorð: Luk. 2,10. |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74